# ki gullnám longur



*- Veiðivirðið hjá Pison í ár er minni enn 50% av veiðivirðinum í 2003. Kortini hongur raksturin hjá skipunum saman, staðfestir reiðarin*

liggur í betra endanum hjá línuskipunum í ár.

Onnur línuskip, sum eisini hava havt eitt lutfalsliga gott ár, eru eitt nú Morgunstjørnan og Sigmundur, sum altíð liggur ovarliga, tá ið saman um kemur.

## Dýrari rakstur

Reiðarin vísir á, at føstu útreiðslurnar, sum fara av óbýttum hjá línuskipunum, eru nógv øktar seinastu árini.

- Eitt skip sum Pison hevur í ár brúkt fyri umleið 1,3 miljónir krónur í agni og 800.000 krónur í olju. Taka vit proviant og landingarútreiðslurnar við, sum eisini fara av ób‡ttum, er talan um einar 2,4 miljónir krónur tilsamans.

Hann sigur, at ein vanligan túr eru útreiðslurnar, sum fara av óbýttum hjá einum skipi sum Pison, einar 150.000 krónur, og hetta eru einar 30.000-40.000 krónur meira fyri hvønn túrin, enn tað hevur verið.

- Við verandi fiskiskapi og prísi skal eitt línuskip helst ikki skylda meira enn einar 6-7 miljónir krónur.

Tórleif Sigurðsson sigur, at Pison fyri fáum árum síðan er umbygdur fyri 9 miljónir krónur, men við tað, at tað hevur gingið so væl hjá skipinum, hevur felagið eisini goldið nógv niður á skuldina, soleiðis at skipið ikki stendur í so nógvum peningi í dag.

- Jú, enn hongur megin-parturin av línuflotanum saman fíggjarliga, men hetta er ikki nakað gullnám longur, staðfestir reiðarin.

Óli Jacobsen:

# Einki grundarlag undir brævinum

ATLANTIC NAVIGATOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Sosialinum herfyri endurgóvu vit burtur úr einum brævi, sum manningin umborð á Atlantic Navigator hevði sent Føroya Fiskimannafelag og fjølmiðlunum. Brævið snúði seg um eina avtalu, sum manningin segði, at FF og reiðarríið hjá skipinum høvdu gjørt.

Stutt eftir, at vit á Sosialinum høvdu fingið hetta brævið, fingu vit boð um, at manningin hevði gjørt av at taka brævið aftur. FF hevði nevniliga sent skipi og manning eina fráboðan um, at avtalan, sum hekk í messuni umborð á Atlantic Navigator, tá ið manningin mynstraði fyrstu ferð, var afturtikin – og at manningin tískil var undir sama sáttmála, sum var galdandi umborð á Nærabergi.

Hóast brævið, sum manningin á Atlantic Navigator hevði sent Sosialinum, soleiðis varð afturkallað, endurgóvu vit burtur úr hesum í næst seinastu útgávu fyri jól.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, gjørdi beinanvegin í e-posti vart við, at hann helt tað vera skeivt av Sosialinum at endurgeva burtur úr einum brævi, sum manningin hevði tikið aftur.

Óli hevur samstundis víst á, at tað ikki er rætt, at Fiskimannafelagið fekk kaldar føtur, tá ið manningin umborð á Atlantic Navigator vendi sær til felagið og pressuna, tí fráboðanin, sum felagið sendi umborð á skipið, var send longu dagin fyri, at felagið og fjølmiðlarnir fingu brævið.

Sunnudagin, 18. desember, bað FF í teldupostі skiparan umborð á Atlantic Navigator boða manningini frá, at "sáttmálin hendan túrin verður tann sami sum við Nærabergi. Tað er eingin annar sáttmáli undirskrivaður. Tá ið hesin túrurin er liðugur, verður skipað fyri fundi, har vit fara at tosa um ein framtíðar sáttmála fyri tykkum..."

Í teldubrævinum leggur FF aftrat, at "best vildi verið, um manningin velur sær ein álitismann at tosa hennara vegna".

Óli Jacobsen sigur, at FF í teldubrævi, mánadagin, 19. desember, fekk at vita frá Atlantic Navigator, at tey høvdu havt trupulleikar við meyl-skipanini, og tí høvdu tey ikki fingið fráboðanina hjá FF fyrr enn hendan mánadagin.

- Hetta merkir, at av tekniskum orsøkum hava brøvini umskarast, og tí er grundarlagið fyri umrødda brævi, sum Sosialurin hevur endurgivið partar av, burtur, sigur Óli Jacobsen.

# a fíggjarmarknaðinum

soleiðis at felagið verður ein deild hjá Kaupthing Bank hf. í Íslandi. Sum er, er Kauphting í Føroyum eitt dóttirfelag hjá íslendska bankanum og virkar felagið í fyrsta lagi sum eitt virðisbrævameklarafelag.

- Nú sáttmálin millum londini kemur í gildi, fær deildin eitt bankaloyvi í Føroyum, sum í fyrsta lagi hevur við sær, at viðskiftafólk fáa eina uppaftur betri tænastu frá einum av teimum stóru evropeisku bankunum, sum Kaupthing Bank nú er vorðin.

Petur Holm, stjóri, sigur, at íslendski bankin við eini eginogn upp á 18 miljardir danskar krónur verður nógv tann størsti bankin á føroyska marknaðinum.

- Soleiðis verður bankin eisini førur fyri at loysa uppgávur, ið føroysku peningastovnarnir higartil ikki hava megnað, leggur hann aftrat.

Kaupthing hevur virkað á føroyska marknaðinum seinastu 5 árini. Byrjað varð við ráðgeving í samband við íløgur í virðisbrøv, síðan legðist Corporate Finance og vinnulívsfíggingin til, og í dag metir Petur Holm, stjóri, at felagið hevur eini 15% av føroysku vinnulívsfíggingini.

Á deildini í Føroyum starvast frá 1. januar 2006 at rokna 14 fólk.

Vit fara at venda aftur til Kaupthing í komandi blaði.

